LM-053/2025

Fylgiskjal 2.

Brotsfrøðifelag Føroya

5. nov. 2025

Ummæli Brotsfrøðifelags Føroya
um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli
Mál nr.: 25/23488

Ummæli um uppskot um broytingar í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli

Vit í Brotsfrøðifelagi Føroya vilja heita á løgsmiðir at hugsa um annað enn vakmyndatól.

Brostfrøðingar eru serfrøðingar í fyribyrging av brotum og viðgerð av brotsligum trupulleikum í eini heildarmynd.

Vit vilja menna skipan og bygnað, har vit nýta føroysku mentanina og siðir saman við gransking okkum øllum at frama. Tað er brotsfrøðilig sannroynd, at vit ofta finna loysnir á trupulleikum og síðan kenna nøgdsemi og tryggleika av tí, til bert at finna útav, at nú lekur aðrastaðni.

Tað er okkara serfrøðiliga meting, at vakmyndatól (ella sjóngá) ikki er vegurin fram til tryggleika og frið á alfaravegi. Tí vilja vit verða við til at skapa karmar um lív í kommunum, sum kann gerast trygt. Hetta við okkara serkunnleika og kanningum, og ikki við sjóngá.

Kanningar

Undir lógaruppskotsins *1.4 Samandráttur av nýskipanini við hugskotinum* stendur, at "[k]anningar vísa, at yvirvøka við vakmyndatólum í sjálvum sær ikki fyribyrgja harðskapi ella onnur sløg (sic.) av atgerðum, sum persónar fremja í sinnisrørslu," og at vakmyndatól ikki kunnu "standa einsamøll." Í hesum kanningum, sum løgmálaráðið í hesum føri vísir á, man teljast 40 ára heildarkanningin eftir Eric Piza, sum er professari í rættarskipan og brotsfrøði, og aðrar. Brotsfrøðifelag Føroya tekur undir við, at týðandi er at vísa á hesa stóru kanning. Henda kanning bendir á tað, sum mongum kemur óvart á - og sum løgmálaráðið nevnir: at vakmyndatól ikki í sjálvum sær byrgja fyri harðskapi. Fyri at skera út í papp, bendir heildarkanningin á hetta: vilt tú hava minni harðskap á almennum støðum, nýt tá *ikki* pening og orku upp á vakmyndatól.

Svensk vísindagrein frá í ár, 2025, vísir á hetta sama, at prógv benda á, at vónin um tryggleika við hjálp av sjóngá ikki gongur út.

"Rising public expectations of state protection have led policymakers in parts of Scandinavia, Europe and the United States to adopt measures promising prevention and safety (Günther, 2013; Lomell, 2014; Simon, 2007). However, police-managed CCTV surveillance of public spaces fails to deliver on these promises—the prevention of, and protection from, violent crime in public arenas. Evidence suggests that surveillance does not prevent or deter the

serious and violent crimes that most fuel public anxiety (BRÅ, 2018; Gerell, 2021; Piza et al., 2018)."[1] (Okkara áherðsla.)

Amerikanskar og svenskar kanningar benda eisini á, at tað er ivasamt, hvussu væl vakmyndatól hjálpa at greiða ("uppklára") brotsverk, serliga samanborið við kostnað og inntriv, sum tað ber við sær.

Møguligir vansar við sjóngá

At kommunur seta upp sjóngá á almennum støðum, kann seta dik á, at føroyingar fáa sær enn fleiri sjóngáartól við hús. Hetta kann gera seg inn á okkara óformligu mentan, sum fremur trivnað millum manna, og sum er ein hin fremsti dýrgripur, vit eiga, at byrgja fyri brotsverki.

Einki forðar fyri, at sjóngá verður sett upp fleiri og fleiri staðir. Tað eru eingi krøv sett, hvussu "serliga útsettir staðir" skulu verða valdir, annað enn politifaklig meting.

Sjóngá kann gera, at fólk kennir seg trygt, men tað kann eisini gera, at fólk kennir seg ótrygt.

Sjóngá kann kann skemma staðin.

Aðrir spurningar

Tá ið fyrsta vakmyndatólið er komið upp, verður tað tá nakrantíð tikið niður aftur?

Hvat skal til í samráði og eftir politifakliga tilmælinum fyri, at vakmyndatól ikki skal verða sett upp, og fyri ikki at endurnýggja tilmælið, soleiðis at vakmyndatólið verður tikið niður aftur?

Nær verður hildið, at tað hevur hepnast væl við vakmyndatólum? Um tað ongan mun ger, skal tað so takast niður?

Nær verður steðgað at seta upp fleiri vakmyndatól? Hvat skal gera, at kommunur og løgregla fara at avmarka nýtsluna av vakmyndatólum?

Um vakmyndatól verður sett upp

Verður heimildin latin og vakmyndatól sett upp, heitir Brostfrøðifelag Føroya á, at byrjað verður upp á kanningar av nyttuni, áðrenn nakað tól er sett upp.

Áðrenn nakað vakmyndatól er sett upp, verða gáaður staður og ógáaður staður, ið líkjast, valdir, so at til ber at bera saman eftir eina tíð. Soleiðis eru bestar treytir fyri at meta um nyttuna. Roynt verður at velja staðirnar tilvildarliga.

[1] Leinki: https://www.scup.com/doi/10.18261/njc.27.1.2

Felagið heldur, at kanningin eigur at fevna um fleiri viðurskifti:

- Hvørt tað veruliga forðar harðskapi.
- Hvørt tað veruliga verður tryggari.
- Hvørt fólk uppliva seg tryggari.
- Hvussu kommunan nýtir heimildina.
- Hvussu løgreglan verður ávirkað av heimildini.

Tilmælið um vakmyndatól

Somuleiðis hevur felagið hesa viðmerking um samráð og tilmæli, um undirtøka verður fyri uppskotinum:

Tað stendur í uppskotinum, at vakmyndatól skulu setast upp "í samráð við politiið", sum eftir "politifakligari meting" ger tilmæli til kommununa, og at "[p]olitiið hevur serligan kunnleika og førleika at meta um, hvar tað kann vera ótrygt á einum øki eitt ávíst tíðspunkt, og á hvønn hátt vakmyndatól kunnu vera við til at fremja tryggleikan."

Soleiðis verður ásett, at tað er politiið, sum metir um, hvussu vakmyndatól kunnu verða við til at fremja tryggleika á ávísum økjum ávís mund. Felagið tekur undir við, at løgreglan hevur serligan kunnleika og førleika at meta um hetta. Kanningar um vakmyndatól koma í stóran mun frá brotsfrøðingum, og millum annað tí hoyra kunnleiki og førleiki í hesum tí eisini serliga brotsfrøðingum til.

Tí heldur Brotsfrøðifelag Føroya, at brotsfrøðingar eiga at verða við í serfrøðiligu (*fakligu*) metingini av, hvar tað kann vera ótrygt, og á hvønn hátt vakmyndatól kunnu verða við til at fremja tryggleikan.

Harafturat er at siga, at løgregla er danskt málsøki og er undir donskum ræði. Hetta kann ávirka leiðslu løgreglunnar á tann hátt, at hon ikki virkar til fulnar eftir føroyskum siðum og mentan. Eisini hetta ger, at tað hevði gagnað hesum málinum og føroyska samfelaginum, at føroyskir óheftir brotsfrøðingar verða við í samráði og tilmælum um sjóngá, saman við løgregluni og øðrum serfrøðingum.

Broytingaruppskot

Felagið mælir, sum sagt, ikki við uppskotinum, men er undirtøka fyri vakmyndatólum, skjýtur Brotsfrøðifelag Føroya upp hesa broyting í § 6 a, stk. 1:

"§ 6 a. Fyri at økja um trygdina á serliga útsettum støðum í kommununi, kann kommunustýrið í samráð við ~~politiið~~ brotsfrøðinevnd og eftir tilmæli frá ~~politinum~~ brotsfrøðinevnd, yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli."

Ummæli Brotsfrøðifelags Føroya
um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli
Mál nr.: 25/23488

Somuleiðis nýtt stk. 2:

"Brotsfrøðinevnd er óheft. Í brotsfrøðinevnd sita brotsfrøðingar og løgreglumenn, ið landsstýrismaður velur eftir tilmæli frá løgregluni og Brotsfrøðifelagi Føroya."

Stk. 2 verður stk. 3 og orðað soleiðis:

"Tilmælið frá ~~politinum~~ brotsfrøðinevnd er galdandi í tvey ár."

Betri enn sjóngá

Átøk um stuðla uppundir góðan gamlan føroyskan sið at ansa eftir hvør øðrum, til dømis við sjálvbodnum, til dømis við náttarravnum. Vit vilja, at náttarravnar skulu vera væl móttiknir og fáa góðar karmar. Náttarravnar er munandi minni inntriv, og munar eisini meiri enn sjóngá at fremja tryggleika, metir felagið.

Brotsfrøðifelag Føroya ráðgevur fegið

Heldur enn at heimila kommunum at gáa við sjóngá, sum sambært kanningum ikki heldur tað, tað lovar, býður Brotsfrøðifelag Føroya sær til at ráðgeva hvørji kommunu sær, hvussu hon kann byrgja fyri harðskapi og øðrum brotum og fremja tryggleika.

Brotsfrøðinevnd

Hvussu fer og ikki, heldur felagið tað vera skilagott at stovna brotsfrøðinevnd, har ið løgreglumenn, brotsfrøðingar og aðrir viðkomandi partar kunnu samstarva um týðandi brotalig og brotsfrøðilig viðurskifti.

Við brotsfrøðikvøðu

Brotsfrøðifelag Føroya

Ingmar Berg Mikkelsen formaður

Daisy Iversen

Jógvan Kallsgarð Joensen

Maria Reynstind